# »Firmaets mand« vorðin stjóri

**26 av sínum 43 árum hevur Gunnar Mohr starvast hjá Poul Michelsen. Hann hevur ongan tíð fingið eina tí einastu lønarkrónu aðrar vegir, og tí kennir nýggi stjórin fyritøkuna út í æsir**

STARVSSETAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast hann bert er 43 ár, so hevur Gunnar Mohr longu hildið silvurbrúdleyp við fyritøkuni, sum hann nú skal stjórna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Talan var um eina lítla stórhending í fyritøkuni, tá P/F Poul Michelsen í gjár hevði nevndar- og aðalfund. Her varð leiðslan í fyritøkuni nevnliga umskipað, soleiðis at hon nú telur tveir stjórar. Ein víðkan, sum meira ella minni er vorðin neyðug, nú fyritøkan er vaksin somikið nógv. Umframt Sólrun Michelsen, ið heldur fram sum forstjóri, er Gunnar Mohr nú eisini stjóri. Ein veruleiki, sum tykist sampakkað væl við yrkisleiðina hjá Gunnari. Ein yrkisleið, sum bara hevur fevnt um eitt og sama felag.

– Eg byrjaði at arbeiða onkrar summarferiur, og tá eg so varð liðugur í skúla í 1980 fekk eg fast starv á goymsluni. Síðani fór eg í skrivstovulæru, var aftur á goymsluni eina tíð, áðrenn eg spakuliga fekk fleiri og fleiri leiðslukendar uppgávar. Fyrst sum innkeypsstjóri, síðani sum sølustjóri, og nú eri eg so ordiligur stjóri sigur hann við einum smíli.

### Royndirnar eru eitt pluss

Sjálvur annar keypti Gunnar seg inn í fyritøkuna fyri nøkrum árum síðani, og tí er tað á ongan hátt ónáttúrligt, at hann nú eisini er við til at mynda formligu leiðsluna. Og hann metir tað avgjørt vera ein fyrimun, at hann at kalla kennir hvønn krók í fyritøkuni.

– Vandin kann sjálvandi vera, at einki nýtt hendir, men tað er so millum annað mín uppgáva at tryggja, at tann støðan ikki íkemur. Hinvegin hevur talan tey seinastu nógvu árini verið um eina fyritøku í rúkandi menning. Vit hava í dag um 50 fólk í starvi, og megna vit at halda so nøkunlunda fast í hesi menning, er heilt væl sloppið.

– Tí fyrst og fremst, so ræður um at fylgja við í tíðarandanum. Sum eg síggja tað, so er talan at kalla um útella avvikling. Handilslívið í Føroyum sum heild mennir seg nógv. Nýggj krøv verða støðugt sett okkum frá kundunum, og hesum mugu vit fylgja. Og sjálvandi mugu vit eisini royna at vera framman fyri hesi krøv og ynski, um tað kann lata seg gera, sigur Gunnar.

### Starvsfólkini í fokus

Við somikið drúgvum áramáli á sama stað, kundi onkur freistast at kalla Gunnar fyri trygdarnarkoman, men hesum tykist hann ikki vilja sameinast heilt so væl við.

– Tað er meira tað, at mær hevur dámt somikið væl her. Júst trivnaður er eftir míni fatan eisini týdningarmesti luturin á einum modernaðum starvsplássi. Starvsfólkini eru so nógv tað største aktivið, sum vit hava, og í so máta hava vit verið heppin – ella dugnalig um tú vilt. Sjálvandi vil ein ávís útskifting altíð vera, og tí hava vit sum so einki ímóti. Men vit hava samstundis eina sera góðu stammu av fólki, sum hava verið her í nógv ár, og tað tryggjar fyritøkuni neyðuga stabilitetin. Ein stabilitet, sum eg vónandi eisini kann vera við til at varveita og menna, heldur hann.

# Býbussur rent á ein vøruvogn



Ein býbussur rendi á ein vøruvogn uppi við Bónus í Havn. Eitt ferðafólk var við í bussinum. Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn veit ikki so nógv at siga, tí at tað er so nýligani hent í skrivandi løtu.

– Vognurin og bussurin rendu saman uttanfyri Bónus í Havn. Eitt ferðafólk var við bussinum. Tað var ein kona, og hon boðaði løgregluni frá. Bussførarin var ikki so væl fyri, og sjúkrabilurin kom eftir honum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Sum tað sæst á myndini, varð bussførarin borin við børu í sjúkrabilin.